Petur & Petur:

# Nýtt virki við drúgvum royndum

**Frá smálýsingum til heildarkonsept, frá hugskoti til marknaðarføring. Teir byrjaðu tveir, nú eru tey 10.**

VIRKISLÝSING

*Ó. J. Rólantsson*



*Petur Mohr Reinert leggur aftrat, at nú góð 4 ár eru liðin, síðan fyritøkan varð stovnað, so sær í baksýni út til at hava gingið rættiliga nógv skjótari, enn teir báðir Slyne og Mohr Reinert nakrantíð roknaðu við. Í dag starvast 10 fólk hjá Petur & Petur og Petur & Petur Publishing, um stutta tíð verða tey helst fleiri.*

1. mars í ár vóru 4 ár liðin, síðani Reklamuvirkið Petur & Petur lat upp. Teir báðir Petur Mohr Reinert og Petur Slyne, sum fleiri ár frammanundan høvdu starvast saman á marknaðardeildini hjá Faroe Seafood, stovnaðu virkið saman við fiskasøluni Farex, og reklamuvirkið kom tí at halda til í R.C. Effersøesgøtu 22, har Farex framvegis heldur til. Tá byrjað var, søgdu teir báðir, at endamálið við virkinum var at veita eina proffessionella og persónliga viðgerð av marknaraføringsuppgávum við tøttum og álítandi samstarvi, har kundin kundi siga sína hugsan, uttan at klamsa við hurðunum.

Í høvuðsheitinum kann sigast, at Petur & Petur, umframt at vera beinleiðis reklamuvirki hjá nógvum fyritøkum, við síni marknaðardeild virkar sum marknaðarráðgevi fyri hópin av stovnum og fyritøkum, framleiðir og umsitir frá smæstu upp til tær heilt stóru grafisku uppgávurnar og prentlutirnar. Stóru messurnar eru mest týðandi parturin av umsetninginum, har Petur & Petur tekur sær av bæði marknaðarføring, sølu og umsiting, umframt design.

## Søgan í stuttum

Í január 2000 varð felagið gjørt um til partafelag, og eginpeningurin varð hækkaður úr hundrað upp í fimmhundraðtúsund. Stutt eftir fær felagið til uppgávu frá Menningarstovuni at gera ein føroyskan bás á altjóða stevnu í Brússel. Hetta var í apríl, og í mei varð flutt í nýggj høli í Jónas Broncksgøtu. Til jóla verður felagið Petur & Petur Publishing stovnað saman við Hanstholm Posten A/S. Endamálið er at geva Vikublaðið út. Í 2001 januar eiga Petur Mohr Reinert og Petur Slyne einsamallir Petur & Petur, og samstundis keypa teir 25% av eini prentsmiðju í Hanstholm, ið fær navnið Hanstholm Bogtrykkeri

Í oktober 2001 verður egin skrivstovubygningur keyptur í miðbýnum, flutt verður í nýumvælda bygningin í august 2002. Í oktober 2001 fær felagið til uppgávu at samskipa North Atlantic Fish Fair 2003. Í januar í ár selir felagið partabrøvini í Hanstholm Bogtrykkeri og keypir partabrøvini í Petur & Petur Publishing, soleiðis at Petur & Petur nú eiga 100% av partapeninginum í Vikublaðnum.

Í dag starvast 10 fólk hjá Petur & Petur og Petur & Petur Publishing. Felagið ger í dag marknaðarføringsuppgávur fyri kundar sum t.d. Bónus, Elding, Faroe Seafood, Maersk, Føroya Banka, Føroya Fiskavirking, Havnar Timburhandil, Havnar Fótbólt, Hotel Føroyar, Menningarstovuna, Miklagarð, Reyni Service, SMS, Trygd, Smyril Line, Burger King, Sunset Boulevard og Atlantic Fair.

## NorthAtlantic Fish Fair eitt stórarbeiði

North Atlantic Fish Fair er ein sera stór messa, tvær hallir, trý tjøld, uttanduraframsýning, framsýning í bátahylinum, nýggja Norröna – umleið 250 framsýnarar á nærum fimmtúsund fermetrum. Atlantic Fish Fair hesaferð er 30% størri enn seinast og hevur stóran altjóða áhuga.

Messan verður hildin í Runavík í døgunum 29. apríl til og við 1. mai. Seinast vóru 212 framsýnarar, umleið helvtin vóru útlendingar. Fleiri enn 7000 gestir vitjaðu messuna, millum teirra umleið 560 útlendingar úr 19 ymsum londum. Roknað verður við tvær ferðir so mongum útlendskum gestum hesaferð.

Hotell og gistingarhús, bæði í Havn og í Eysturoynni, eru at kalla fullsett hesar dagarnar, men nýggja Norröna kemur at liggja við kai í Runavík sum hotellskip. Umborð verða eisini fleiri fyrilestrar, pressufundir o.a.

## Úr Brússel til North Atlantic Fish Fair

Petur Mohr Reinert, annar av stjóunumi í Petur & Petur, sigur, at hetta við at fyriskipa messur komst av, at Menningarstovan bað Petur & Petur um at gera føroyska felagsbásin á heimsins størstu fiskivinnumessu í Brússel. Hetta var ein áhugaverd, men sera stór uppgáva.

– Hetta er nú fjóðra árið á rað, vit standa fyri hesum arbeiði, og í ár gera vit ein felagsbás upp á 256 fermetrar við trettan føroyskum fyritøkum. Í veruleikanum hevur Menningarstovan verið høvuðssamskipari, men henda leiklut hava vit eisini yvirtikið nú, sigur Petur Mohr Reinert.

– Petur Slyne og eg hava í veruleikanum báðir arbeitt við messum síðani byrjanina av nítiárunum. Og í dag hava vit úr at gera á hesum øki. Vit fyriskipa eisini offshorebásin á oljumessuni í Aberdeen í august, og í september eru vit á Dan Fish í Ålborg saman við Atlantic Fair. Messan í Ålborg líkist Atlantic Fish Fair, og tað eru eisini teir báðir Áki í Skemmuni og Andrias Jacobsen, ið standa fyri føroyska felagsbásinum, meðan vit standa fyri design og básbygging. Vit kunnu siga, at hetta er ein »avleggari« av tí framúr góða samstarvinum við teir báðar.

– Okkara arbeiði í sambandi við North Atlantic Fish Fair umfatar fyrst og fremst at gera eina marknaðarføringsætlan og síðani at selja framsýningina. Hetta merkir luttøku á óteljandi messum í grannalondum, Evropa og so langt burtur sum í USA og Kina. Vit hava vitjað ótaldar fiskaríhavnir, havt fundir við nógvar kommunur, skipa felagsbásar og serbásar o.s.fr. Harumframt gera vit alt tilfarið, faldarar, formularar og brosjurur, vit umsita eisini ordarmóttøkuna og útvega útgerð til básar, umframt design, sjálvandi, sigur Petur Mohr Reinert.

## Gott samstarv

– Okkum hevur dámt avbera væl samstarvið við Atlantic Fair. Áki og Andrias eru menn, sum vita, hvat teir fara eftir og hvar teir gera. Runavíkin er sera væl egnað til slíka messu, tí har eru sera nógv viðkomandi virki á staðnum og í nánd.

– Eitt nú halda útlendingar, at tað er ótrúligt, at vit kunnu skipa slíka framsýning í eini havn, har vit t.d. kunnu hava flótandi framsýningar. Tey eru ikki von við at síggja ein trolara »live«, men heldur eitt modell ella eina mynd. Sama er við framsýning av bátum og eitt nú aliringum í sínum rætta umhvørvi, sigur Petur Mohr Reinert at enda.

Petur Mohr Reinert leggur aftrat, at nú góð 4 ár eru liðin, síðan fyritøkan varð stovnað, so sær í baksýni út til at hava gingið rættiliga nógv skjótari, enn teir báðir Slyne og Mohr Reinert nakrantíð roknaðu við. Í dag starvast 10 fólk hjá Petur & Petur og Petur & Petur Publishing, um stutta tíð verða tey helst fleiri.

At enda kann nevnast, at fiskimálaráðharrin, Jacob Vestergaard, er boðin at hava fiskimálaráðharrafund í sambandi við stevnuna i Runavik. Hann hevur tikið av, og eftir hvat skilst, so koma fiskimálaráðharrar úr fleiri londum á fund í sambandi við stevnuna.










